# NÓGV KÆRA SÍNA NEYÐ

**FACEPAPE** ER EIN HEILT **STÓRUR** TRUPULLEIKI OG TAÐ ERU **RÆTTILIGA** NÓGV, SUM **VENDA** SÆR TIL **DÁTUEFTIRLITIÐ** AT KÆRA SÍNA **NEYÐ**



**FACERAPE**
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

– Tað er ótrúligt, men eg havi varhugan av, at tey ungu taka tað yvirhøvur ikki í álvara.

– Og tað gera foreldrini kanska heldur ikki.

Vit hava eina mammu í telefonini, sum ógvuliga fegin vil varpa ljós á eitt fyribrigdi, sum hevur tikið seg upp í kjalarvørrinum á teirri eksploderandi nýtsluni av Facebook í Føroyum, eins og í øllum heinum annars.

Og tað er eitt fyribrigdi, sum alt ov nógv kennast við.

Tað, sum hendan mamman hugsar um, er, tá ið óviðkomandi fara inn á facebook vangamyndina hjá øðrum og skriva okkurt upp á nakkan á teimum, sum síðani fer út um allar geilar á netinum.

Hetta fyribrigdi er so vanligt, at tað hevur eitt heiti.

Ikki eitt føroyskt heiti, men eitt enskt heiti.

Og heitið er Facerape.

Hetta er eitt fyribrigdi, sum øll kenna til og sum heilt nógv hava upplivað á egnum kroppi.

Í Føroyum er hetta lítið kannað, men aðrastaðni vísa kanningar, at annarhvør Facebookari hevur verið facerapaður, sigur Dátueftirlitið.

## Ongin álvari

At facerape er so vanligt, kemur í grundini ikki so óvart á hesa mammuna, vit hava í telefonini.

–Tað vísir seg sum um at tey ungu als ikki taka hetta í álvara. Men tað vísir seg eisini sum um at nógv foreldur heldur ikki síggja álvaran í hesum.

– Men tað áttu tey at gjørt, tí hetta er alt annað enn skemt, staðfestir hon.

Hon sigur, at tað, sum verður lagt á Facebook, verður goymt í allar ævir.

Facebook hevur tilskilað sær treytaleysan rætt at goyma alt, sum verður lagt á síðuna, bæði tekst, myndir og filmsupptøkur.

Tí er altíð vandi fyri, at upplýsingar, sum eru lagdir á Facebook, koma fram aftur í ljósið í heilt øðrum sambandi.

– Í veruliga lívinum hevði ongin góðtikið at givið so nógv rættindi og so nógvar upplýsingar frá sær, sum tey glaðbeint geva Facebook, tá ið tey stovna sær eina vangamynd, ella skriva á síðuna.

> Í veruliga lívinum hevði ongin givið so nógv rættindi frá sær, sum tey glaðbeint geva Facebook

– Vit eiga eisini at minnast til, at ein stórur partur av teimum upplýsingum, vit leggja á Facebokk í teksti ella myndum, eru øgiliga persónligir upplýsingar.

## Foreldrini

Hendan sama mamman heldur, at tað fyrst og fremst eru foreldrini, sum eiga at átaka sær ta ábyrgd at læra børnini góðan sið á internetinum.

Men hon heldur eisini, at skúlin kundi gjørt meiri við tað, hóast hon eisini ásannar, at tað er mark fyri, hvat kann stúvast inn í skúlan.

Men tað eru eisini nakrir skúlar, ið taka hendan trupulleikan í álvara og royna at læra næmingar vísa góðan sið á internetinum.

– Tað einasta, vit kunnu gera, er at uppala børnini til at vísa góðan internetsið og tað eiga vit at gera.

– Men tað kann vera nokk so tørført, tá ið heldur ikki foreldrini í nógvum førum heldur ikki skilja álvaran í hesum, kanska tí tey hoyra til tað ættarliðið, har tey ikki eru so von við internetið.

## Nógvar kærur

Ingunn Eiriksdóttir, stjóri í Dátueftirlitinum, staðfestir at tey fáa nógvar áheitanir frá fólki, sum kærir sína neyð, tí tey hava verið fyri Facerape.

Hon sigur, at rættiliga nógv Facereyp kann tykjast at vera meinaleyst skemt, har ongin ivi er um, at talan er um Facerape.

– Men tað eru eisini nógv dømi um, at farið verður rættiliga langt út um mark og tá er tað altso ikki stuttligt meir.

Tað er eisini so ymiskt, hvat fólk halda vera stuttligt. Og tað er heldur ikki vist, at tað, sum er stuttligt í dag, eisini er líka stuttligt um nøkur ár.

## Ólógligt

Tað kemur eisini fyri, at fólk, sum hava gjørt seg sekan í Facerape, enntá hava broytt loyniorðið, so at tann, ið eigur vangamyndina, ikki so frægt, sum sleppur inn á sína egnu vangamynd at bøta um skaðan.

– Facerape eigur undir ongum umstøðum at verða góðtikið, tí tað svarar til at skriva eitt bræv til onkran í navninum á einum øðrum.

Ingunn Eiriksdóttir staðfestir eisini, at Facerape er beinleiðis ólógligt, tí tað er brot á persónsupplýsingarlógina.

Men hinvegin hevur hetta lítlar og ongar avleiðingar við sær, leggur hon afturat.



*Facerape er ramasti álvari og tí er tað spell at børn og ung og foreldur bara sláa tað upp í glens. Dátueftirlitið fær nógvar fráboðanir um facerape og útspillingar og niðurgerðingar á Facebook og stjórin sigur, at tað eigur ikki at verða góðtikið*

ILLUSTRATIÓN: SOSIALURIN